Amnesty International Føroyar
www.amnesty.fo
28. septembur 2026

LM-015/2026

VIÐMERKINGAR
UPPSKOT TIL LØGTINGSLÓG UM BROYTING Í LØGTINGSLÓG UM FOSTURTØKU

Yvirskipaðar viðmerkingar

Amnesty International er altjóða mannarættindafelagsskapur. Í øllum viðurskiftum byggja okkara sjónarmið seg á altjóða mannarættindalóg.

Sambært altjóða mannarættindalóg skulu kvinnur hava rætt at taka avgerðir um egna nøring, og skulu hesar avgerðir takast av egnum vilja uttan tvingsil, harðskap, hóttanir ella óneyðugar forðingar. Eingin skal verða trýst at taka abort, og eingin skal verða noktað at taka abort.

Galdandi lóg, ið kom í gildi 1. juli 2026, var eitt framstig fyri mannarættindi hjá gentum, kvinnum og øllum, ið kunnu gerast upp á vegin. Broytingarnar í fosturtøkulógini, ið uppskotið leggur upp til, avmarka kropsliga sjálvavgerðarrættin hjá kvinnum og serliga hjá gentum. Verða broytingarnar samtyktar, er talan um eitt greitt afturstig fyri mannarættindastøðuna í Føroyum.

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar

§1 og §7: kravd ráðgeving og umhugsunartíð

Lond hava skyldu at tryggja munagóða atgongd til abort - uttan forðingar, seinkingar ella avmarkingar, ið gera seg inn á mannarættindi hjá teimum, sum eru upp á vegin[1].

Verandi lóg gevur kvinnum tilboð um ráðgeving, sum kommunulæknin skal kunna kvinnuna um. At áleggja kvinnum kravda ráðgeving og umhugsunartíð er at gera seg inn á teirra sjálvavgerðarrætt, at vanvirða teirra førleikar at taka egnar avgerðir og leggur eitt trýst á kvinnuna. At áseta umhugsunartíð er eitt læknafrøðiliga óneyðugt stig at taka, viðførur óneyðuga seinking, [2]verður gjørt fyri at geva kvinnum skuldarkenslu. Vit óttast eisini, at ein slík umhugsunartíð kann føra við sær, at kvinnan fer út um loyvda vikutalið.

Slíkar forðingar verða eisini frámældar av ST-nevndum- og stovnum t.d.:

[1] Human Rights Committee, General Comment 36, supra note 18, para. 8.
[2] Amnesty International, *When Rights Aren't Real for All: The Struggle for Abortion Access in Europe*, EUR 01/0275/2025 (6 November 2025)

- Nevndin, ið varar av kvinnusáttmálanum hjá ST: finnist at forðingum, ið lond seta í verk fyri at seinka ella nokta trygga abort, herundir eisini kravda ráðgeving[3] og bíðitíð[4].
- Mannarættindaráðið undir ST, HRC: vísir á at forðingar fyri abort hótta rættin hjá kvinnum til lív, og heitur á lond um at strika slíkar forðingar[5].
- Heimsheilsustovnurin, WHO vísir á, at "kravd bíðitíð kann hava við sær seinkan av røkt og soleiðis seta í vága atgongdina hjá kvinnum til trygga og lógliga abort og viðurkennur ikki kvinnur sum skikkaðar avgerðartakarar."[6]

Í Amnesty er okkara sjónarmið, at haldgóð, heilsufaklig og óheft ráðgeving um abort skal standa kvinnum, sum eru uppá vegin, í boði. Tað er tó av stórum týdningi, at hendan ráðgevingin er eitt tilboð og ikki eitt krav, at ráðgevingin er í trúnaði, at ráðgevingin er óheft, umframt at tey, ið ráðgeva, eru viðkomandi fakfólk.[7]

Amnesty Føroyar mælir tí frá at seta inn krøv um ráðgeving og umhugsunartíð. Krøvd ráðgeving og umhugsunartíð eru ikki ein hjálp hjá kvinnuni at koma til røttu avgerðina, men ein forðing hjá kvinnuni at taka abort.

§9 og §10: Krav um samtykki frá foreldrum/verja

Við uppskotinum skulu børn og ung undir 18 ár í øllum førum - tá talan ikki er um neyðtøku, blóðskemd o.t. - hava loyvi frá foreldrunum til at taka abort. Hetta er ein herðing frá verandi lóg, har samráðið skal tryggja barnsins besta, og skal gentan, sum er upp á vegin, tryggjast ta verju og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá henni. Í broytingaruppskotinum skal samráðið einans taka støðu, tá gentan hevur verið fyri neyðtøku, blóðskemd o.t., og verður atlit tí ikki tikið til barnsins besta.

Í Amnesty halda vit, at børn og ung, ið eru upp á vegin, skulu hava bestu umstøður, stuðul og ráðgeving í slíkari støðu. Ung vilja møguliga hava stuðul frá verjum ella foreldrum, tá tað kemur til at taka avgerðir, men kravt samtykki frá foreldrunum er ikki í tráð við altjóða mannarættindi, av tí at slík krøv ikki virða rættindini hjá børnum og ungum[8].

Her er serstakliga viðkomandi at hava í huga, at kynsligi lógaldurin í Føroyum er 15 ár[9], og tí er tað undrunarvert, at rætturin at taka avgerðir um viðgongu ikki er fevndur av sama aldursmarki.

[3] CEDAW Committee, Concluding Observations: Hungary, UN Doc. CEDAW/C/HUN/CO/7-8 (2013); Russian Federation, UN Doc. CEDAW/C/RUS/CO/8 (2015).
[4] CEDAW Committee, Concluding Observations: Hungary, UN Doc. CEDAW/C/HUN/ CO/7-8 (2013), para. 30.
[5] General Comment No. 36 hjá ST-Mannarættindanevndini (HRC) viðvíkjandi rættinum til lív (grein 6 í ICCPR).
[6] WHO, 'Safe abortion: Technical and policy guidance for health systems' (2nd ed., 2012), supra note 54, p. 96.
[7] WHO, 'Safe abortion: Technical and policy guidance for health systems' (2nd ed., 2012), supra note 54, p. 36.
[8] M.a. Barnarættindasáttmálin hjá ST, serliga grein 3 og 12 ið tryggja barnsins besta og barnsins rætt at verða hoyrt og virt
[9] Smb. § 222 í Revsilógini, Løgtingslógarkunngerð nr. 8 frá 20. februar 2024

Sambært nevndini, sum varar av barnarættindasáttmálanum, er neyðugt at lond tryggja:

- Atgongd til heilsutænastur (herundir abort) uttan lógarkravt samtykki frá foreldrum/verja[10]
- Ung, ið eru upp á vegin, hava rætt til at verða hoyrd og vird í avgerðum um egna nøring og abort. Ung skulu hava í boðið ráðgeving frá heilsu- og sosialstarvsfólki til tess at ásanna hvat er til størsta gagn fyri tey. Hetta kann (men *skal* ikki) hava við sær at ráðføra seg við foreldur ella verja[11]

Sambært WHO eigur loyvi ella samtykki frá foreldrum ikki at vera krav, áðrenn ung taka abort. WHO vísir á, at lond skulu viðurkenna vaksandi førleikan hjá børnum og ungum at taka avgerðir, sum ávirka teirra egna lív[12].

Ásetingin ið lagt verður upp til í broytingaruppskotinum kann koma at merkja, at gentur, sum ikki ynskja at fullføra viðgonguna, men har foreldrini eru ímóti at dótturin tekur eina abort, verða tvingaðar til at fullføra viðgonguna. At tvinga eitt barn at fullføra eina viðgongu kann fáa stórar avleiðingar fyri framtíðina og lívið hjá barninum, sum er upp á vegin. Børn og Ung skulu ikki vera fyri mismuni orsaka av aldri, tá tað kemur til at taka avgerðir um egna nøring, herundir abort.

Amnesty Føroyar mælir til at tryggja at tey, sum eru undir 18 ár, fáa ta hjálp og umsorgan tey hava tørv á fyri at koma til ta avgerð, sum er rættast fyri tey. Tey mugu hava ávirkan á teirra egna lív og framtíð, og í lógini má barnsis besta tryggjast.

§2: Sálarlig og likamlig orsøk strikað, og §3: Sálarlig sjúka strikað

Mannarættindanevndin hjá ST vísir á, atlond kunnu regulera abort í lóggávu, men lóggávan skal ikki hava við sær brot á rættindi til lívið hjá tí sum er upp á vegin, ella brot á onnur rættindi eftir mannarættindasáttmálanum. Tí mugu avmarkingarnar ikki seta lív teirra í váða, útseta tær fyri kropsligari ella sálarligari pínu ella líðing, ið brýtur við grein 7 í mannarættindasáttmálanum, sum diskriminerar tær ella leggur uppí teirra privatlív.[13]

Við at strika ásetingina um, at tá inntrivið er neyðugt at forða fyri at likamliga og sálarliga heilsan viknar munandi og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður, ber til at taka abort uttan loyvi frá samráðnum eftir viku 12, verða enn fleiri forðingar, ið hvørki eru vitanargrundaðar ella heilsufrøðiligar lagdar aftur at fosturtøkulógini. Broytingin ger seg sostatt inn á fleiri av rættindunum hjá tí, ið er upp á vegin og setur sálarligu og likamligu heilsuna hjá kvinnuni í váða.

[10] UN Committee on the Rights of the Child (CRC), *General Comment No. 15 (2013) on the right of the child to the enjoyment of the highest attainable standard of health*, UN Doc. CRC/C/GC/15
[11] UN Committee on the Rights of the Child (CRC), *General Comment No. 20 (2016) on the implementation of the rights of the child during adolescence*, UN Doc. CRC/C/GC/20
[12] World Health Organization (WHO), *Abortion care guideline*, 2nd ed. (Geneva: WHO, 2025), Law & Policy Recommendation 7: "Third-party authorization."
[13] Human Rights Committee, General Comment 36 (Article 6: Right to Life), UN Doc. CCPR/C/GC/36 (2019), para. 8 (hereinafter: Human Rights Committee, General Comment 36).

Sama ger seg galdandi í §3 stk. 3, har møguleikarnir hjá samráðnum at taka støðu út frá smalkast. Í verandi lóg kann samráðið loyva abort eftir viku 12, um vandi er fyri at barnið "*orsaka av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívið fær álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku*". Við broytingaruppskotinum verður orðið "*sálarliga*" strikað.

Amnesty Føroyar mælir tí frá broytingunum í §2 og §3, sum smalka um møguleikan til abort vegna sálarliga og likamliga heilsu.

Áheitan: virðið rættindini hjá gentum og kvinnum

Okkara áheitan til løgtingsfólk, ið skulu taka støðu til broytingaruppskotið, er, at rættindini hjá gentum og kvinnum, sum eru upp á vegin, eru í miðdeplinum í fosturtøkulógini.

Um ynski er um at fækka talið av abortum, mæla vit til at virða ábyrgdina, sum lond hava at tryggja atgongd til aldurshóskandi, munagóða og vitanargrundaða seksualupplýsing, umframt at tryggja lætta atgongd til góða fyribyrging,[14] heldur enn at leggja forðingar inn fyri kvinnur, ið ynskja abort, og avmarka teirra kropsliga sjálvræði.

[14] Human Rights Committee, General Comment 36, supra note 18, para. 8.